Grýlan

Hetta er søgan um Grýluna í Stapa, eina undarliga veru, sum ikki er greitt at siga frá, tí eingin kennir Grýluna uttan Ungi-Dunaldur, og hjá honum er læst fyri munni við sjey innsiglum. Og fór hann at siga frá, er óvist at tað hevði borið til, tí orðini tróta hjá honum. Sál hansara blómar á annan hátt, gleði hansara er sum spelandi kálvar, sútin sum fjaðursárir fuglar, eingin uttan valdsharrin mikli hevur sama álit á sjálvum sær sum hann, og eingir uttan tjóvar og ránsmenn, ið leiddir verða til avrættingar, munnu kenna seg so nívdar í sálini sum Dunaldur, tá ið ekki og iðran herja orðleys á hann aftan á hansara ólátasveiggj. At royna at lata alt hetta í orð er mest sum ovboðið, er sum at royna at týða tað, sum dýrum býr í huga. Frásøgnin her verður tí ikki annað enn kám endurmynd av lutum, sum sterkir og málleysir eru.

★

Grýlan hevur tilhald uppi á loftinum í einum úthúsi hjá Unga-Dunaldi. Her, í einum myrkum rúmi ovast undir mønuni, hølist hon. Ikki uttan einans ferð á ári kemur hon undan kavi og gongur millum manna og eigur sítt stóra kvøld. Kurpalinum hon býr í sleppur eingin at innanífrá, einasta inngongdin er lúkan í skjøldrinum, men har er stongt við ramligum lási og haraftrat neglt uppfyri. So statt hongur búrið hjá Grýluni millum himmals og jarðar, bølamyrkt og

avbyrgt sum ravnsreiðrið í hamrinum. Her uppi bølir hon so alt árið og bíðar eftir sínum tíma, væl krógvað og goymd, men ikki gloymd. Hvør gloymir Grýluna?

Og kortini er eingin sum rættiliga minnist hvussu hon er vorðin og kann at siga frá tí. Hon er ógvuliga loðin og hevur horn og hala, hon rýkur illa og letur undarlig ljóð frá sær, nú venandi, nú ræðandi, nú ógreinilig, sum í ørvitslag av kæti ella neyð, stundum syngur hon eisini, kvøður gomul ørindi ella gátufør niðurløg. Skortinum á henni fær eingin skil á, stórur er hann og grefligur, men krógvaður undir einum hurlivasa av strýggjum og kloddum. At eyguni í henni lýsa í myrkri kann mangur vátta, men tað man so vera mest sum tað einasta vissa er um viðvíkjandi hennara útsjónd. Hvussu hon er vorðin innan veit eingin, medferðin er gátufør, hevur røtur í døkkari fyrndar nátt.

Dunaldur er einasta fólk sum av sonnum er kunnugt við Grýluna. Men hvussu annars er teirra millum er blint fyri øllum. Tað veitst at hann í linum løtum hevur kallað hana bæði byrði og banning. Mangur undrast eisini á hetta sambandið Dunaldur hevur við Grýluna. Dunaldur ger vanliga lítið um seg, er eitt sindur smæðin til, kroystur og mótleysur á málinum, ærligur og tunglyntur í eygunum. Hann hagar sær so, at fáur hugsar um at hann hevur nakað við Grýluna at gera. Øll har í oynni bera Dunaldi alt gott, hann er beinasamur og viðeiriligur, er góður bønarmaður hjá bóndunum, dúgligur til alt útiarbeiði, ein sannur verkhestur, og hann er fátækur, so eingin øvundar hann fyri tað hann fær í inntøku av Grýluni. Og eingin argar Dunald, rætt er tað at hann er einki ovvit, men býttur er hann heldur ikki, minnið hevur hann gott, veit væl skil á skyldskapi og kann meira av kvæðum og rímum enn aðrir menn. Men við øllum tí góða tey hava at siga um hann, so er hann ikki sum hinir, hann er einstøðingur og serur, og hetta kemst av Grýluni.

Tað er mánadagur eftir Sunnudag Seksagesima, og Dun-

aldur kennir sær henda ófriðin í kroppi og sál, sum altíð kemur á hann hesa ársins tíð. Sami ampi er á konuni, hon suffar og bínir fram fyri seg, einki glað, og í kvøld hevur hon grátið, sum ikki sjáldsamt er, tá ið hon veit, at Dunaldur er farin at pjakast við Grýluna. Hon veit, at nú er Dunaldur uppi í hasum vanlukku tippinum. Hon hevur hoyrt hann taka spíkarar úr lúkuni, hon hevur hoyrt veikt hvin, sum tá ið naglar verða rinkaðir varisliga út. Lúrt hevur hon kortini ikki, tað sømir seg ikki fyri hana, og tað loysir seg ikki. *Tað* fer at henda, sum henda skal, og sum verið hevur á hvørjum ári nú í fjúrtan ár, og fyri ta tíð í margatali av myrkum árum, tá ið tað var faðir Unga-Dunalds, Gamli-Dunaldur, sum gekk Grýluna, og fyri hansara tíð *hansara* faðir.

Jú, Dunaldur er uppi í búrinum, hann er hjá Grýluni. Her er myrkt sum í munni, ja sum í skøtukjafti á havsins botni. Her rýkur við lít av hýggi, av turrum roti, av ull og hornum, og hann andar henda tætta deymin inn í seg, situr leingi og dusar sær í hesum roykinum, sárur í sinni og ekkafullur í hjarta, sum hann hugsar um tað ið fer at koma. Uttanfyri er kvøldið við sínum ljóðum, sjógvurin andar langan sum tíð og ævinleiki, tað runar við klettin og dunar spakt og tómt innan av botni í Marrugjógv. Dunaldur trilvar fyri sær í myrkrinum við grommum hondum, eymkar seg grælandi, gessur situr í svølgrúminum á honum og ger hann ólátaðan. Jú, alt er her, skinn og spjarrar, høvdið, fløskan og stongin. Alt samalt er sum hann gekk frá tí í fjør, alt er í lagi. Hví skuldi ikki tað verið? Rottur og mýs eru ongar í oynni, og eingin er kettan, og tjóvar og trælskir jassar munnu halda seg burturfrá. Dunaldur er ágrýtin í lótum og tekur inn í myrkursins fylta munn við øllum tungunum, tonnunum og úlvsunum, og sigur uttan at tala inn í seg sjálvan: Hetta eigi eg. Hann verður kátur uppi yvir sínum gripum, hann flennir ljóðleyst fyri seg sjálvan í einsemini og myrkrinum, dregur fróur í huga andan inn, og eitt lítið kikk hoyrist í gómanum sum hjá konufólki ið dánar.

Hann kennir á sær, at nú er hann farin at broytast, hamskiftið er í koming, er longu byrjað.

Dunaldur sær á konuni, at hon veit hann hevur verið uppi hjá Grýluni. Hon hevur grátið. Hetta er seint á kvøldi, genturnar sova. Tað er so undarligt lag á Dunaldi, so er altíð, tá ið *tað* er í umbúna, hugi hansara er mest sum ikki rættiliga uppi í øllum tí vanliga, ein hinna er komin upp ímillum hann og gerandisdagin, hann tekur at undrast at hetta er heimahús hansara, og at henda stórvaksna Signa við sínum starandi fuglaeygum er kona hansara. Undarligt er eisini at hann longu eigur átta børn. Undarligt er tað við tí, at alt eru gentubørn, eingin sonurin, hann einasta kallkykt millum níggju konufólk. Undarligt er eisini at hugsa sær, at brátt fer at vera ríviligt av kjøti í hjallinum, turrum kjøti og kjøti at koyra í pottin, ikki minst av hesum seinna, sum gul, næstan sleikjandi guva fer at standa upp av. Moyrt, dimmreytt ræst kjøt við skyggjandi glærfiti í. Væl bótað grágul súpan, sum kráar í hálsinum og kemur út í hvørja tægr.

Signa kveitir, sum snarast, at honum, tí tað elvir sárseyka, tað nítur í hjartað at síggja, at hamskifti er farið at koma á Dunald, tað er sum alún á sálini og fær hana at hveppast við. Eyguni í honum eru smá og hava fremmant ljós í sær, hann er linur í hálsinum av einum tokka, sum ikki er til hennara, hann fær ikki krógvað burtur sína loyniligu gleði og sítt ágrýtni. Á gævi, alt var av. Tí ígjøgnum alt hetta verður farið — eisini í ár.

★

Tað ber til at siga um allar ársins halgu høgtíðir, at tær eru íkomnar av rættum og við skili. Páskir eru uppreisnar dagur, tá ið vetrartrongdin fer at lætta. Hvítusunnan er innkoman í summarið, tá ið grasið grør og mjúkt mál er fyri oyrum. Jólini eru ein rumbul í myrkrinum, gleði og gaman, sum spretta úr

ársins djúpa botni og ganga sum fyrijáttandi silvurrípur gjøgnum sinnini. Føstugangur, afturímóti, er óheilagur, ja so vanheilagur, at mangur metir hann ikki fyri annað enn ein kross og eina plágu úr heidnari tíð. Ymsastaðni á bygd kemur og fer føstugangur, og eingin gevur honum gætur, hann er mest sum ikki til. Men í Stapa stingur hann seigan røtur sínar í karga jørð og fæst ikki upp aftur. Ikki er fólk her ringari til ella seigligari í lyndi enn aðrastaðni, men í hesum líkjast tey burturfrá, stutt at siga, tey halda inngangin at føstuni í anda teirra undanfarnu, soleiðis sum teimum er í blóði borið. Okkurt burðarbúgvið og snúðurvundið ber við sálirnar, eldur kyknar upp og krevur at fáa mettu sína, áðrenn hann sloknar.

Mánadag á føstugangi er dansur í einum hvørjum valahúsi, øll eru uppií uttan tey ið sjúk eru ella karlagin, etið verður og drukkið, og leingi verður hildið á. At vísa seg er hetta høgtíðarhaldið í tí mesta ikki ólíkt øðrum veitslum og samsætum, men munur er, og eingin ivast í tí, heldur ikki nú á døgum, at føstugangsmánadagur ber í duldum við sær eina pinkulítla, lagnukvidna linkan í sinninum, er ein søtur leki onkustaðni niðri á botni, ein leikur í myrkrinum, tá ið tey í spølni rætta sín lítlafingur út ímóti Illamanni. Teir eldru smakka sær á í meira lagi, so sjálvt teir smædnastu fara at erpa sær og tøguligir verða mælskir, ungdómurin verður framførari enn vant, lokkingar lúra í krókum og á loftum. Aftaná er kúrur í huga og reinsan, sum eftir fullgjørdar neyðsynjargerðir. Tað gerst næstan ikki at greiða frá hesum, hvussu tað ið ikki er reint fær elvt reinleika fram, ja upplyftan, men tað er sum tá ið kúgv við síni stóru rísnu tungu sleikir sín nýkálvaða kálv og etur alt tað skitna í seg, sum uppi á honum er, og fær hann at skína.

Eini tíggju ár herfyri tók ein rørsla seg upp í oynni móti føstugangshaldi, men hon munaði lítið, minkaði burtur, tá ið tað kom undan kavi, at trúboðin, sum fyrisprákari var, var eitt avlagað neyðardýr, sum rann eftir smágentum. Einki varð

gjørt við henda undarliga mann, tey lótu hann fara í friði, men eftir tað hava tey lítið virt trúboðar har í oynni. Grýlan, sum hesin ókunnumaðurin hevði gingið so harðliga ímóti og havt so ringt orðalag til, at mongum tókti synd bæði í henni og Dunaldi — Grýlan fekk aftur fullar sømdir. Ikki so, at tey tosaðu um hana, vardu hana og róstu henni. Grýluna ber ikki til at hava so á máli, sum tá ið sagt verður frá frálíkari mjólkkúgv ella góðum graðhesti, hon verður ikki soleiðis tikin upp á tunguna, hon er ikki fólk við dygdum og lýtum, hon er bert Grýlan í illum og góðum, hon gongur, og so ikki meir.

Hon gongur týskvøldið á føstugangi, tá ið fólk eru móð av veitslu og sveiggi, tá ið tey hava andsperri bæði í kroppi og sál og Illimaður telur lítlafingrar aftan fyri bak á teimum í myrkrinum.

Nú er hon aftur har, eingin hevur sæð hana koma niður av Dunalds lofti, eingin veit úr hvørjari ætt hon kom. Nakrir smádreingir vilja vera við, at teir sóu hana koma lúrandi niðan úr Marrugjógv. Men komin er hon, gongur í mánaleysari dimming, kemur vaðandi, lág og breið, eftir runutum túni, lyftir sínum hyrnta høvdi og lækkar tað aftur, letur klænmælt sum eitt pinkubarn, stórlær og flennir við djúpari mansrødd. Hon er mikil í vavi, sum ein torvlutur at sjá, dregur sín langa hala ringlandi eftir sær, tað skramblar sum av tómum ketlum og kastirollum av hesum halanum, og gangurin er nógvur í heilum sum í eini dvørgasmiðju. Stundum kemur steðgur í, Grýlan leggur seg í túnið við skortinum niðureftir sum eitt ið nóg illa er til, er sum túva millum túvur, við hvørt lyftir hon høvdinum uppfrá og tevjar móti hesum surkandi myrkrinum, ella hon melur seg í ring og dansar við spøkum stigi á staðnum. Tað hendir seg eisini, at hon loypur uppfrá, ger klombrut hopp frameftir og verður sum ein fjóskát kúgv.

Fylgið hjá Grýluni eru hálvvaksnir dreingir, genturnar aftra seg, og ikki minni smábørnini, tora nóg illa at lúra seg til

at hyggja at Grýluni úr vindeygum ella skotum. Men sjálvt stórir slúrar halda seg fyri tað mesta frá. Eittans fólk í fylginum ger vart við seg í lótum, tað er Óli hekk, ein hálvgamal minkur, sum er ikki rættiliga sum hann skal, hann er altíð ovurkátur í slíkum føri, ýlir og apar sær, so eingin veit hvørt hann er illur ella ovurglaður. Óli hevur lamna tungu og fær ikki sagt annað enn hetta eina orðið *hekk*, og hevur so navnið av tí. Fólk miða seg eftir hekk-látum Óla og vita so altíð, hvar Grýlan er stødd. Leiðin hjá henni liggur snarað og skákað sum best ber til, hon fer ikki hús úr húsi, ger langar sveipir, villist út í bøin, hvørvur millum grótið á áarbakkanum, snýr sær aftur at húsum, har setir so Grýlan onkustaðni skortin inn um gátt og verður standandi stutta tíð ella longri.

Í summum durum dvølur hon væl longri á og ger okkurt um seg, í støðum kemur hon heilt inn í køkin ella roykstovuna og verður har eina góða løtu. Tað er undantak, at nakar gevur henni durafjórðingin, so hon fer eftir hæli út aftur, í flestum húsum er hon væl fagnað og fær sínar gávur: breyð ella dríl, køkur, brennivín, onkustaðni ein penga, annars mest turt kjøt, bøgir, tjógv ella síður, sum hon stingur inn undir hamin. Har sum hann veit tað ber til og verður ikki illa upptikið, letur hann Stongina koma undan kavi, og hon er ásjónlig, mikil og skapað sum hon eigur. Hon er ikki fyri hvørs mans eygu, men annars er løgið so mong sum tola sjónina av henni og viðurkenna tað, ikki bert mannfólk, men eisini kvennkynið, ja, sjálvt eldri konufólk smæðast ikki. Gamalt fólk minnist ella í hvussu er hevur hoyrt um farnar tíðir, tá ið Stongin var ikki bert vælkomin, uttan tá ið tað var hildið at vera ein signing, at hon kom til sjóndar í einum húsi, og hin vegin at tað var eitt ringt merki, um so ikki varð og Grýlan leyp húsið um. Ungar konur, við ongari signing í hjúnalagnum, fingu heilsubót, nurtu tær við Stongina við sínum nakna holdi undir skjúrtinum. Men eisini aðra gróðursemi var Grýlan hildin at bera, bæði hjá neytum og jørð, ja, eisini veiðieydnu hildu tey hana

bera við sær. Álitið á hesi megnandi evni man vera minkað síðan tá, men rættiliga burtur er tað ikki, tað livir tigandi í mongum sinni, eisini hjá teimum sum ikki vita av hesum.

★

Men nú Dunaldur sjálvur?

Fáur dugir at hugsa sær til, hvussu hann er fyrikomin, ið Grýluna gongur. Hann krevur at vera eitt ross í styrki, sum skal bera alla hennara tyngd og tola varman og hesa trongu luftina og óreinskuna undir tungum skinnum og troyggjum, og samstundis røkja tað roksuta og drúgva verkið hjá Grýluni. Dunaldur orkar, hóast hann er lítið til manna. Hann *vil* bera sigurin heim sum so mangan áður, ikki vera aftari enn teir sum undan fóru. Hann hevur arvað hesar sjáldsomu gávur: eigur listamansins styrki í leiki og er skyldurøkin sum ein íðin prestur. Sum hann reikar her í vindi og myrkri á hesi ómildu oyggj er hann ein lívsins boðberi, er helst heiðin, gaman í, men hann er ikki tann Antikrist, sum hin dømandi trúboðin heldur hann vera. Hann er Anti-Deyðin. Hetta vita øll, hóast tey vilja ikki vera við tað, tí er gleði og væltoknan á leiðini hjá Grýluni, eitt sindur tortrygg gleði helst, tí Illimaður við sínum kymbli av samandrignum lítlafingrum er ikki langt burturi, og hvat tey so tora at siga um Grýluna, so man eingin nokta fyri, at hon er ikki Gudi til tokka. Gud og Grýlan eru ósambærlig, hesir báðir máttirnir eru sum eldur og vatn, tað sjóðar og sortnar har sum teir møtast, og tí verða teir hildnir strangliga hvør frá øðrum. Føstugangur hevur ongan Gud, hann hevur Grýluna. Onkuntíð niðri í tíðar myrkri var Grýlan almáttug, tað minnist eingin, men ørminni um hetta er tó í blóðinum sum fiskur á botni í djúpum kavi. Satt er tað, at almátturin er Guds, men eittans kvøld á øllum ársins mongu døgum kann Grýlan kortini kanna sær.

Soleiðis hugsar ikki Dunaldur, tankar hansara lata seg ikki í

prýðiligan orðbúnað, teir bragda eins og frummáttir og dreymar, stíga fram sum fyrndargomul uppvellan í sinninum, eru sum skýggj full av kava, sum streymur í havinum, teir halda honum uppi og gera hann føran fyri at bera hesa illtungu byrði, sum marvar og elvir skriða á bakinum á honum, so sveittin lekur av honum, og guvan av kropshitanum setir sannar proppar í andaholini í holdinum. Ja, sjáldsamir, ódeyðiligir og navnleysir máttir rørast í Dunaldi og gera hann stinnan og lættan, fylla hann við miklum og rættvísum framføri, gera tað hugfarsligt at vera gágga í hesari pertnu skel.

Hann tekur um Stongina, tað elvir ørandi kenslu av alvi og evnum at hava henda borin hjá sær, henda navarin, henda undursama reiðskapin til varðveitslu og endurnýggjan.

Tað er ikki eiti á magn, í Stongini er! Verður so ríviligt til av fiski á grunninum til várs sum í fjør, so er ikki sørt, at Stongin eigur sín part í hesum. Hon fer eisini at fáa vart fyri, at várkuldin í ár verður til bága í lembingini, so at felli verður sum í fjør. Hon fer eisini at fáa mýkt várskerpingin, landsynningstømingin um páskirnar, sum nívir vøkstrinum, og hon fer eisini at fáa byrgt upp fyri heystrotuni, sum gevur rakstrarhoyggj og minkar um neytatalið. Hon fer at signa sáð í jørð og í hvørjum kviði, til eydnu og sælu er hon skapt, til undur og frøi á mangan hátt hjá skapninginum í song, í fjósi, í reiðri og á rókum og í sjógv. Hon er til, til tess at lívga alt livandi.

Gomul orðleys lovkvæði, duld og botnleys, leika Dunaldi í huga, hann fær ikki greitt fyri sær hvat tey hava at týða, tey eru ikki útgrundandi, men megin í teimum syngur langan innan í honum sum sjóðandi meldur í streymi undir nýtendraðum mána, nú hann er í hæddini hjá evnum sínum og fullger sítt lívskall. Mikil er gróðursemin í Grýluni, endurris skal hon vekja, sterkar lutir skal hon fáa skrið á, hon er kúgv og tarvur, ryssa og hestur, hon er í felagsskapi við gruggutan

rognasjógv á grunnum og grøndimman bláma, sum stendur um hvalir ið parast í miklum fjarleika undir himmalinum, hon kennir sortan, har sum sólkoma og niða møtast og alt kyknar upp úr ongum, hon er hin bráða lindin av gróðri, tá ið hann sum eitt stjørnuskot av megnan kveikist í syndaflóðarmyrkrinum og letur lívið vinna á deyðanum . . .

Soleiðis syngur magnið í Dunaldi í miklum, ørandi løtum, men ikki er hann alla tíðina staddur í slíkari hædd, møði og ivi koma við hvørt oman yvir hann í nívandi aldum og óløgum, tá má hann lata linka á seg koma, tá er tað, Grýlan leggur seg flata og letur seg hvørva í myrkrinum, tá er tað maðurin innan í henni kennir seg ræddan og niðurundirkomnan sum Jónas í hvalsins kíki og má noyða hetta heskna brennivínið niður í seg, hóast hann annars ikki leskar tað. Neyð er á honum, hann spýr bæði gor og gall og fellir sølt tár, men eitt sindur seinni bilar ikki, tá kemur lívsviljin rokmikil aftur á hann. Hann kagar út ígjøgnum nasagluggarnar á Grýluni, sum eru eygu hansara, sær hvar hann er staddur, reisist og gongur longri fram á vegin.

Hekk! ljóðar sum herróp frá Óla, sum víkur ikki eitt eygnablunk burtur frá Grýluni.

★

Seytjan eru húsini í Stapa og ikki fleiri, og fyri midnátt er Grýlan mest sum liðug at ganga um bygdina. Eftir er endabresturin, hin mikli seinasti dansurin, sum er krúnan á gestferð hennara, og sum verður framdur á Innistovutoftini, eini gamlari toft av húsum sum brunnu í grund, har er nú samkomustaður í bygdini.

Boðað verður frá hesum mikla grýludansi við nýggjum og ágrýtnum hekkrópum, og rok og røringur kemur í trunkin av hálvvaksnum dreingjum. Deilt verður, tað svitast ikki, nú ræðimiklar møður koma eftir teimum yngstu at reka teir til

hús. Eftir verða so teir treiskastu og óargaligastu, og upp í teirra hóp kemur skilliga eisini tilkomið fólk, sum ikki man vera av besta slag. Í hesum bili er ikki ljós at síggja nógvastaðni í vindeygum, húsini knokkast dimm og sløkt við síni lodnu tekju upp ímóti norðlýsisloftinum fyri handan hav. Men onkur pjakast í vindeygum her og har, andlit hómast í smogum og skotum. Í Dunaldshúsi er sonn myrking, og tað við vilja, har er innanfyri sorg og skomm, kona og døtur eru niðurfarnar, tær yngstu bipa, men Signa og báðar tær elstu sova ikki, og myrkrið í hesum tronga svøvnkamarinum er fult av suffandi órógv. Í huga Signu er nátt, hon hevur brynjað sær hjartað við herðslu, frost hevur fest seg í hvørt glopp í sálini.

Úti í túni er nú hent tað sum vant er at henda: Grýlan er balstýrin, hon tumblar og trumsar higar og hagar, kvøðandi mál trokast innan í honum sum frá fleiri monnum ið dansa, og halin skramblar við tann øgiliga gang. Og hygg nú: knappliga lyftir hon frampartin uppfrá sum ein graður hestur og sendir út úr sær eina gneggjan so harða og lívkenda, at tað nítur í merg og mønu — eitt menniskjaligt meistaraverk av ljóði, sum eingin gloymir, ið hoyrt tað hevur. Og í vaksandi norðlýsinum sæst at Stongin er á lofti og í frekum røringi. Øgiliga reystreist melur ódjórið sær í klingur, sum ein klokka av myrkri við berum og leikandi kúlvi, ein so marghátlig sjón, ein so sjáldsom opinbering, at áskoðarin bert stendur og gapar og gánar. Húsini standa og gløa, svartir rútar glana, eygu hómast í øllum krókum, aftan fyri forhang og í hurðagloppum, og Óli hekk gloymir at rópa. Í hesi miklu náttarkvirru hoyrist einki annað enn hesin gessigi og ræðiligi fossurin av djóragreði, sum vellir upp úr kjaftinum á Grýluni.

So sígur hesin stóri kroppurin niður aftur, legst flatur og er sum farin undir heilt. Soleiðis liggur Grýlan eina stund, tey ið næst standa hoyra hennara stun undir jørð, sum so við og við verða trongur hosti og hálvkøvd máttleys venan.

So reisist hon aftur, og nú er at fara til hús, tí nú er hennara tíð av. Stirðilin er úr henni farin, lin í kongunum og sløðrandi hvørvur hon í myrkrinum, og nú er einki uttan at fáa frið hjá henni, eingin eigur at fylgja henni til hennara væl uppibornu hvíld. Tað veit eisini Óli hekk, hann stendur tigandi og turkar sveittan av enninum, hjá honum við var hetta eitt stríggið kvøld.

★

Hjá Dunaldi verður nú ein eftirleikur við bæði ræðuligum royndum og sælum.

Øtiligt, ja avmergjandi at deyðans marki, hevur stríð hansara verið hetta kvøld, men tá ið hann so er heimafturkomin og hevur vundið av sær sín kavváta karm niður á gólvið í sínum svalliga úthúsi, er møðin runnin av honum, er rikin burtur av pínuni. Eitt bil grætur hann sum eitt barn og svølgir henda salta rákan. Ongum skapningi á jarðarríki er slíkur tørvur á ugga sum Dunaldi nú, á skilningi og á umsorgan. Stutt síðani miðdepil í leiki fyri manna eygum er hann knappliga vorðin einsligasta vera í oynni, eitt sum er fyri happinum, eitt spott og eitt neyðardýr, eitt pestfongt. Svongd og tosti eru á honum í kroppi og í sál, skitin er hann, útdálkaður og útskotin, eingir eru vinirnir, eingin varðar av honum. Tí einki man bata at fara til Signu og royna at fáa hjartað at blotna í henni, tað veit hann av tungum royndum, hon hevur fryst seg sjálva inni, í vikur fer hon at hava seg undan honum, og sama fara døturnar, eisini tær yngstu fer Signa miskunnarleys at halda frá honum. Mat fer hon ikki at seta fyri hann, og leguna, sum honum so nógv er tørvur á, fer hon at sýta honum. Hann verður at halda til í Grýlubølinum, liggja her í myrkri og kulda, samankrøktur í einsemi av óávísum angri og ótta. Annað fólk torir hann heldur ikki at síggja hesa fyrstu tíðina, soleiðis er hann nú eina ferð fyrikomin, tað krevur tíð og tol og er ein ófatilig fyritøka at komast burtur aftur úr Grýluheiminum til veruleikan og lívið.

Hetta er nú ikki tað versta. Nógv verri er tað, at hann fær ikki gramt seg fyri Gudi og leitað sær himinsins ugga. Ikki tí, eingin er komin til Dunalds at trútta hetta niður í hann, nei, tað er sovorðið hann veit og altíð hevur vitað og sum øll vita: sumt er so vorðið at tað er ikki til hjá hinum Hægsta, at tað samtykkir ikki við hansara halga álvara. Men á hesum leiðum fær Belsabubb afturfyri leikað og látið sum hann vil, og hann man ikki vera seinur at koma. Eg meini tað, hann er so nær hjá, at ein kennir tev frá honum av bukki og brendum horni.

Soleiðis er neyðin á Dunaldi, hetta er gjaldið hann verður at lata, tað fær ikki annað verið, hin kalda ræðslan sýnir sín miskunnarleysa skort, og einki gerst uttan at geva seg undir hana og tola pínuna, honum er vís.

Men áðrenn hann gongur inn undir hetta okið, skal hann kortini finna sær ugga og fáa burtur úr hesari nátt ein sælan og forkunnugan ávøkstur. Tað er hugsanin um henda ávøkstur, sum ger byrðina av iðran og tunglyndi tolandi og letur so mikið av ljósi inn í myrkrið sum er, at ikki sleppur vónloysið at ráða einsamalt.

Dunaldur suffar langan og fer fastur í ráðum at grópa í grýlufonginum, rúgvuni á gólvinum liggur, heingir upp kjøtið, tekst við at fáa skil á øllum. Men tá kemur brádliga møðin á hann aftur og pína, og hann orkar ikki meira, eldkorn og blomstur spríkja fram í myrkrinum um hann, uppskakandi sjónir leika innan í honum, kruvdar trøllsólir og sjónotur, nei, nú má hann fara, nú er at henta ávøksturin og sløkkja tostan.

★

Her verður ikki sagt frá øllum tí, sum hendi á náttarvitjan Dunalds hjá Isuni, bert í stuttum greitt frá høvuðsheitunum. Isan, ella Elisabeth, sum skírnarnavn hennara er, býr í einingi, men tað er ikki av tí, at hon, sum onkur kundi hildið, ræðist fólk ella hevur nakað at dylja í lívi sínum. Tvørturímóti, fá konufólk í Stapa eru so víðgongd sum hon og so

eftirspurd og vird. Hon er hjálparkona og kokkur í brúdleypum og ervum, stendur jarðarmóðurini undir lið mest sum hvørja ferð kona eigur, hon er ikki sørt læknakøn og veit ráð fyri mongum, sum pínir menniskjuni, og hon er ikki pírin við hjálp síni. Hon er einasti skapningur í oynni, sum skilur hvat ið gongur á Dunald hesa nátt, og veit ráðini, sum doyva kunnu ágangin og veita hesum illa stadda manni lina í neyðini.

Fyrst stákar hon fyri ressandi máltíð, tað er eitt nú urtasuppa og tveir ráir eggjareyðar. Meðan hetta er í gerð er tøgn, einki verður spurt ella fregnað, eingi øsandi orð ella áminningar. Tað er ikki sørt, at hátíðardámur er yvir borðinum í hesi hugfarsligu og nossligu stovuni hjá Isuni, her er sum ein aftan, Isan sjálv í sunnudagskjóla við nýstroknum blomstrutum fyriklæði, eldurin brimar í ovninum, og sveiggið í klokkuni á bróstinum gongur við hábærsligum knykkjum í kvirruni.

Meðan Dunaldur etur reikar Isan úti í køkinum fyri tvátti. Ein lýggj ond av sápu og guvandi vatni vevst upp í kaffismílin, eisini seingjarklæðini verða fløvað, og rein handklæði gjørd til. Aftan á tváttin, sum krevur vatnskifti fleiri ferðir og ikki gerst uttan hjálp frá Isuni, leggur Dunaldur seg reinur og nossligur at hvíla seg og hyggur at, hvussu Isan vaskar og skolar hansara dálkaðu klæði og heingir tey upp at torna. Isan er reyðdæmd, eyguni sera blá og bráð, hon er farin um tey fjøruti og hevur sitið einkja í fimtan ár. Um tað ber til at kalla hana einkju, tí óvist er, um maðurin er ikki á lívi enn. Pól í Soylu, sum tey kalla hann, var ein undarligur forherðingur, drakk og var harðligur av lyndi, tað var ikki stuttligt at vera Isan, meðan tey vóru saman. So fór hann frá henni og flutti til Norðvíkur í Húsoy og helt seg har at einum øðrum konufólki, men seinni fór hann eisini frá hesi hjákonuni og fór av landinum. Nóg mikið um hann, hann er ikki verdur at minnast, og eingin saknar hann, alraminst Isan.

Dunaldur kennir seg komnan aftur í barndómsins fyrstu dagar her í hesi línrúkandi songini hjá Isuni. Blíðir, siglandi streymar renna innan í huga hansara, kvøldsins hendingar fjara burtur, alt verður líðandi vaggað til hvíldar í einum havi av gloymsku, løtan letur seg upp sum ein undarlig og sæl blóma, einasta, í heiminum er. Dunaldur er aftur ovfarin og um at gráta. Men mitt í sæluni er ein kuldablettur, eitt sárseykakorn av sút. Enn er tað ikki annað enn eitt byggkorn, men tað fer at næla, og nálin fer skjótt at vaksa og breiða út síni stóru bløð av kvíða og myrking. Men undurmikil er sælan, meðan sárseykin enn er ikki annað enn eitt sáð í mold hennara.

So verður sløkt. Eina handstund sláa ræðsla og ótti sínar myrku veingir um hann. Men so er Isan hjá honum, tigandi og kvirr, men við brennandi kinn.

★

Í lýsingini fer Dunaldur oman í fjøruna. Her stendur hann og starir út í hav eina stutta stund, áðrenn hann fer heim til pønitensuna í Grýlubølinum á tí svarta loftinum.